# Hugans torgitnu vegir

**Tað eru hugans ofta torgreiddu vegir heldur enn myndevni útifrá, sum seta dám á nýggjastu málingarnar hjá Pól Skarðenni, sum eru at síggja í Norðoya Kunningarstovu í løtuni**

LISTAFRAMSÝNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tey flestu kenna ivaleyst best listamannin Pól Skarðenni frá hansara landslagsmyndum, og Pól ásannar eisini, at fría náttúran oftast hevur verið hansara málistova. Sínar nýggjastu málningar hevur hann tó verið noyddur at mála innandura, og úrslitið er bæði øðrvísi og forvitnisligt.

### Tankatorn

Tá Pól Skarðenni herfyri varð spurdur, um hann vildi koma at sýna fram í Norðoya Kunningarstovu, var hann heldur trekur at siga ja. Orsøkin var, at hann nýliga var skurðviðgjørdur í vinstra armi, ið hann vanliga eisini málar við, men hugurin at royna allíkavæl, var ikki soleiðis at kveistra burtur.

– Eg visti, at eg ikki kundi mála myndirnar úti, tí tað krevur, at tú mást lyfta armin, og tað fái eg ikki beint nú. So eg valdi at taka hetta sum ein áhugaverda avbjóðing og mála inni í verkstovuni við høgru hond, sigur Pól, sum ikki dylur yvir, at hann helst ikki vil læsa seg fastan sum siðbundnan landslagsmálara.

Og nýggja avbjóðingin má sigast at hava havt eitt sera forvitnisligt úrslit. Serliga eru tað teir báðir abstraktu málningarnir "Úr hugaheimi", sum vísa eina heldur øðrvísi síðu av listini hjá Pól Skarðenni. Myndirnar eru ímyndir av mátanum, okkara tankasett eru sett saman, sum eitt slag av tankatorni, har onkur brot tykjast rættiliga heilskapað, meðan onnur bert hómast sum pettir, tí okkurt annað kemur fyri.

– Eg havi leingi verið sera upptikin av, hvussu vit hvør í sínum lagi seta okkara tankasett saman, og hvussu vit allatíðina byggja víðari á tað. Okkurt hava vit lært í barndóminum, okkurt trúgva vit bara, okkurt vita vit ella halda okkum vita o.s.fr. Úrslitið er, at okkara tankasett verða so ymisk, at tað ofta verður sera torført at skilja hvønnannan – sum alt kjakið um Muhammed tekningarnar beint nú jú er eitt gott dømi um, sigur Pól. Hann leggur afturat, at hesir málningarnir eisini kunnu síggjast sum ein ímynd av, hvussu vit nærum verða tveitt inn í heimin, har vit hvør í sínum lagi verða noydd at savna pettini, so vit kunnu gerast okkurt slag av heilskapaðum menniskjum.



*Landslagsmyndirnar hjá Pól Skarðenni ímynda hesuferð ymisk landslagshugløg*

### Landslagshugløg

At arbeiða við abstraktum myndum kennist sum at fara at ferðast inn í myndina, heldur Pól, sum oftast brúkar langa tíð um hesar myndirnar, og illa dugir at siga, nær tær kunnu metast at vera "lidnar"

– Onkur hevur sagt, at munurin millum eina abstrakta mynd og eina siðbundna landslagsmynd, er, at tað ikki bert til at forklára eina abstrakta mynd, um tú ikki stendur hjá henni. Eisini tí tað allatíðina ber til at finna okkurt nýtt í henni hvørja ferð, tú sært hana, greiðir Pól frá.

Okkurt bendir á, at listamaðurin hevur tikið nakað av hesum við sær í nýggju landslagsmyndunum á framsýningini. At myndirnar hesuferð vórðu málaðar innandura, nýtti hann eisini sum høvi at ríva seg meir leysan frá myndevninum enn vanligt. Hóast hann hevur havt ávís landsløg í huganum, eru hesar myndirnar meir at kalla hugløg ella tulkingar, sum eitt nú "fjørumyndirnar", har ein eitt sindur spøkilsiskendur dámur eyðkennir myndina.

– Øllum dámar ikki líka væl hesa broytingina í landslagsmyndunum, men tú kanst jú ikki verða øllum til vildar. Besta drívmegin at mála er jú, at eg sjálvur haldi tað vera stuttligt, sigur Pól Skarðenni.

Framsýningini hjá Pól Skarðenni í Norðoya Kunningarstovu er at síggja fram til 10. mars



*Í myndini "Úr hugaheimi" hugleiðir listamaðurin um, hvussu ymiskt okkara tankasett eru sett saman*

# Alt fleiri danir í 30unum umhugsa sjálvmorð

**Triði hvør dani, sum ringir til ráðgevingina Lívslinjuna er millum 30 og 39 ár. Ráðgevingin søkir nú eftir fólki at taka ímóti økta talinum av uppringingum**



*Alsamt fleiri sjálvmorðshóttir danir í 30unum leita sær hjálp hjá Lívslinjuni*

KREPPUHJÁLP

Higartil hevur mest verið tosað um tey heilt ungu og tey gomlu, sum ringja til ráðgevingina, men sambært leiðaranum standa tey 30 til 39 ára gomlu fyri einum triðingi av teimum á leið 11.000 uppringingunum, ráðgevingin fær árliga.

### Ilt við at klára gerandiskrøv

– Tað er ikki longur nokk at siga, at vit skulu halda serliga vakið eyga við teimum ungu, teimum eldru og teimum sálarsjúku, tá tað ræður um sjálvmorðstankar, sigur leiðarin á Livslinjen, Michael Esmann, sum vísir á, at alsamt fleiri kvinnur og menn í 30unum, antin tey eru støk ella liva í parlagi, hava tørv á hjálp at handfara sítt lív.

Summi av teimum leita sær hjálp hjá Lívslinjuni, tí tey ganga við sjálvmorðstonkum, meðan onnur eru í ferð við at gera sjálvmorð, tá tey ringja. Orsøkirnar eru ymiskar, men ofta kenna tey seg einsamøll og hava ongan at tosa við um sínar trupulleikar. Onnur kenna seg ørkymlaði í leiklutinum sum pappforeldur í eini modernaðari familju, og hava trupult við at liva upp til stóru krøvuni á arbeiðsplássinum og í parlagnum.

Michael Esmann heldur gongdina vera órógvandi, tí sum hann sigur

– Vit hoyra jú bara frá teimum, sum hava dirvið og orku til at ringja.

Frá 2004 til 2005 vaks talið av uppringingum til Lívslinjuna við 38% frá 8.199 til 11.333.

Í desember í fjør víkaði Lívslinjan telefontíðina við fimm tímum um døgnið, og nú verður søkt eftir fleiri sjálvbodnum afturat teimum 130 ráðgevunum, sum longu starvast hjá tænastuni.

**ave**

# Nýggj bók um Trónd Patursson

Leygardagin kom út nýggj bók um listamannin Trónd Patursson. Samstundis lat upp ein framsýning á Museet for Religiøs kunst í Lemvig við nýggjastu listini hjá listamanninum

Í bókini, sum eins og framsýningini hevur heitið "Høje himle – dybe grunde", gevur kendi listakritikarin Torben Weirup eina hugtakandi lýsing av listini hjá Tróndi Patursson, har høvundurin millum annað vísir, hvussu stórsligna føroyska náttúran hevur verið og framvegis er ein týðandi kelda til íblástur hjá listamanninum. Í úrvalinum av verkum leggur bókin seg eftir at vísa arbeiðið hjá Patursson seinnu árini, har serligur dentur er lagdur á allarnýggjastu glasmálningarnar.

Tað er forlagið Thaning & Appel sum gevur út "Høje himle – dybe grunde". Bókin er 100 blaðsíður.

**ave**




*Nýggja bókin um listina hjá Tróndi Patursson leggur seg serliga eftir at lýsa nýggjastu glasmálningar*